VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi og norði. Skýggjað og kavælingur. Hitin um 5 kuldastig



Veðrið sunnudagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av norði. Skýggjað og okkurt kavælið. Móti kvøldi lækkar hann niður í útnyrðing og minkandi niður í gul til stívt andøvsgul, og meira klárviðrað. Hitin millum 2 og 5 kuldastig.



Veðrið nýggjársaftan:
Sum frálíður gul til stívt andøvsgul av vestri. Skýggjað og í skiftum regn. Hitin millum 2 kuldastig og 2 stig.

Veðrið nýggjársdag og mikudagin:
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, sum lækkar niður í sunnan og økir vindin møguliga upp í hvassan vind. Skýggjað og í skiftum nakað av regni. Hitin økist til millum 2 og 6 stig.

Jólamenn taka samanum

Nú jólini eru farin at fjara, gera jólamenninir seg til reiðar at fara djúpt inn í hellið aftur. Vit hittu teir eina seinastu ferð áðrenn, bara fyri at runda jólini eitt sindur av nú tað stundar til nýggjárs

Rúnar Reistrup

Teir báðir einastu autoriseraðu føroysku jólamenninir, Greytasleikur og Kertustubbi, vóru eitt sindur moyrir, tá Sosialurin fekk samband við teir triðja jólamorgunin. Tá høvdu teir havt eini hugnalig jól har nokk var at gera sum altíð. Jólamenninir fylla sum kunnugt jólahosurnar og umframt hetta hava Greytasleikur og Kertustubbi millum mangt annað havt úr at gera við at práta við øll børnini, ið hava ringt inn til Útvarpið um jólini.

– Tað var strævið til tíðir, og vit eru jú ikki heilt ungir longur, men vit halda áfram við sama huga, siga teir báðir reyðklæddu skeggvaksnu menninir, sum tóku sær av løttum eftir at hava fylt eitt ótal av hosum.

Drekka bara jólaøl.

Greytasleikur og Kertustubbi eru elstu jólamenninir í Føroyum, og teir hava hug at royna at halda teir yngru á rættari leið.

– Ein rættur jólamaður roykir sjálvandi ikki og drekkur bara jólaøl. Og so er hann í einum hampuligum jólamansbúna og ber seg ikki undan, tá tørvur er á eini hjálpandi hond, eru teir báðir gomlu skjótir at svara, tá vit spyrja teir, hvat teir halda um hinar jólamenninar í Føroyum.

– Og eftir hesum, so eru jólamenninir í Føroyum sum heild á góðari leið, hóast onkur kanska onkuntíð hevur verið eitt sindur raskur at kaga niður í kaggarnar, halda teir báðir eldru jólamenninir.

Greytasleikur og Kertustubbi hava sum flestu aðrir jólamenn nógv at gera, og tí eru teir kanska ikki so ofta at síggja til jólahald í desember mánað. Har plaga aðrir jólamenn at vera, serliga hevur jólamaðurin Kjøtkrókur verið nógv at sæð, og tað dámar Greytasleiki og Kertustubba væl.

– Vit jólamenn eru nógv eftirspurdir, so tíbetur eru vit fleiri. Kjøtkrókur hevur spurt okkum eldri um mangt og hvat og skal eg geva honum eitt orð við á vegnum, so er tað at hann líkist okkum nokkso nógv, og tað er ikki so galið, haldi vit, sigur Greytasleikur.

Í hellið trettanda

Hóast jólaaftan er farið um bak og hosurnar bæði eru fyltar og tømdar aftur, so eru jólamenninir ikki farnir djúpt inn í hellið aftur enn. Tað verður ikki fyrr enn trettanda, tá jólini eftir gomlum siði enda, og jólamenninir leggjast inni heilt til fyrsta sunnudag í advent í komandi ári.

Tó plaga jólamenninir onkuntíð at koma úr hellinum á hásummri fyri at hitta aðrar jólamenn á árligu altjóða jólamansráðstevnuni, har Greytasleikur og Kertustubbi altíð eru bodnir við. Sjálvir ganga teir við dreyminum um einaferð at bjóða øllum heimsins jólamonnum til Føroya at vitja, men tað verður ikki rættiliga enn.

Brúðarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralið 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷14
Nuuk	0
Qaqortoq	0
Ammassalik	÷9
Saint John's	3
Halifax	0
Reykjavík	÷7
Seyðisfjørður	÷6
Tórshavn	÷1
Lerwick	÷2
Aberdeen	0
London	8
Tromsø	÷8
Bergen	÷4
Oslo	–
Stokkhólm	÷11
Keypmannah.	0
Helsinki	÷11
Moskva	÷4
Berlin	1
Warzawa	1
Kiev	÷2
Bukarest	0
Paris	3
Madrid	3
Róm	6
Malorca	15
Athen	11
Malta	–
Tunis	–
Beijing	3
New Dehli	12
Bangkok	31
Jakarta	31
Sydney	–
New York	0
Miami	16
Los Angeles	13
Meksikobýur	–
Panama	32
La Paz	14
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	33

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst yvir Norskahavinum dýpist spakuliga og trýstið er høgt í ein útnyrðing úr Íslandi og køld luft rekur inn yvir oyggjarnar. Mánadagin fer eitt hátrýst inn yvir Bretsku oyggjarnar.



Yvir Føroyum rekur at byrja við vindur av vestri, seinni av útsynningi. Seinni fer eitt djúpt lágtrýst við Suðurgrønland eystureftir og hevur vind og lýggjari luft við sær.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 27/12 kl. 06⁰⁰– 28/12 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: ÷2,3°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,2 mm – mált frá 27/12 kl. 06⁰⁰– 28/12 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 65,8 mm

Antennu-monteringar
Vit avgreiða allar antennu-monteringar
- Komplettar nýmonteringar
- Útskifting og umvæling
- Felags antennuanlegg
Fokus ELEKTRONIK
Reynstún 19 • Argir
Tlf. 311306 • Fax 311306

BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

VESTFALLSKYRRINDI

21. des.: Mánin longst frá jørðini
22. des.: Fyrra kvarter
30. des.: Fullmáni
2. jan.: Mánin n. jørðini/Jørðin n. sólini

Ketla. Almanakkin 2001

Dagur	Suðuroyar—/ Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/ Sundalagnum fp.	sp.	Vestmanna—sundi fp.	sp.	Mykines—firði fp.	sp.	Nólsoyar—firði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvanna—sundi fp.	sp.	Fugloyar—firði fp.	sp.
29. des	05.22	17.47	04.22	16.47	04.37	17.02	07.22	19.47	08.22	20.47	03.37	16.02	02.37	15.02	05.37	18.02	06.37	19.02	05.07	17.32	06.22	18.47
30. des	06.13	18.40	05.13	17.40	05.28	17.55	08.13	20.40	09.13	21.40	04.28	16.55	03.28	15.55	06.28	18.55	07.28	19.55	05.58	18.25	07.13	19.40
31. des	07.07	19.34	06.07	18.34	06.22	18.49	09.07	21.34	10.07	22.34	05.22	17.49	04.22	16.49	07.22	19.49	08.22	20.49	06.52	19.19	08.07	20.34
1. jan	08.00	20.27	07.00	19.27	07.15	19.42	10.00	22.27	11.00	23.27	06.15	18.42	05.15	17.42	08.15	20.42	09.15	21.42	07.45	20.12	09.00	21.27

5 707265 100067 >